FISKIMÁLARÁÐIÐ

P/F Skip (undir stovnan)
Tummas Henriksen

mykines.tummas@gmail.com

**Stjórnarskrivstovan**
13. august 2018
Mál: 18/00254-2
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: RR

Tygara skriv:

## Umsókn um menningarkvotu 2018

Vísandi til umsókn tykkara frá 28. mai 2018, skal Fiskimálaráðið boða frá, at verkætlan tykkara fær tillutað niðanfyristandandi kvotur treytað av, at:

- Skjalprógv um eginpening og skipakeyp fyriliggur
- Ein íløgu-, fíggjar- og rakstrarætlan eigur at fyriliggja fyri samtaki P/F Skip (undir stovnan) og P/F Snarfrost (undir stovnan)
- Skrivlig avtalu millum P/F Skip undir stovnan og P/F Snarfrost um at veiðan frá menningarkvotuni, í tann mun tað er gjørligt, verður latin flakavirkinum í Miðvági.
- At felagið sendir útgreinaða tíðarætlan fyri nær íløgurnar á virkinum væntast at verða liðugt gjørdar og klárt verður at taka móti fiski á virkinum.

Tillutaðu kvoturnar:

| tons | Svartkjaftur | Makrel | Sild |
|---|---:|---:|---:|
| 2018 | 10.400 | 2.002 | 1.593 |
| 2019, 2020 og 2021 | 10.400 | 1.710 | 1.593 |

Legg til merkis, at tillutaðu kvoturnar fyri árini 2019, 2020 og 2021 í talvuni omanfyri verða stillaðar vísandi til §4, stk. 2 í kunngerðini um menningarkvotur, har tað er ásett, at menningarkvota, ið er játtað fyri 2, 3 og 4 ár, verður seinnu árini lutað í sama lutfalli, prosentparti, av samlaðu føroysku kvotuni av ávísa fiskaslagnum, sum kvotan hevði fyrsta árið.

Tann tillutaða kvotan skal gagnnýtast innan fyri verkætlanina. Í tann mun kvotan ikki kann gagnnýtast innan fyri verkætlanina, skulu tit boða Fiskimálaráðnum frá hesum innan 3. september 2018. Fiskimálaráðið kann taka aftur tann partin av kvotuni, sum ikki kann gagnnýtast innan verkætlanina.

Avgerðin er grundað á, at metingarnevndin metir, at verkætlanin er nýskapandi við høvuðsdenti á góðsku og nýggjar marknaðir, og vil geva munandi virðisøking. Verkætlanin vil geva økta førleikamenning og fleiri og støðugari arbeiðspláss í økinum (heilársbeiði). Staðsetingin er í einum øki, har rættuliga avmarkað atgongd er til sjófeingi.

Menningarnevndin mælir til at lata hesar nøgdir í 2018: 13.000 tons av svartkjafti, 2.224 tons av makreli og 1.770 tons av sild. Fyri tey trý árini 2019-2021, ávikavist 13.000 tons, 1.900 tons, 1.770 tons um árið. Fiskimálaráðið hevur lækkað nøgdina av svartkjafti við 20% og nøgdina av makrel/sild við 10% í mun til tilmælið frá metingarnevndini, tí allar umsóknir ikki eru endaliga viðgjørdar enn.

Omanfyrinevndu skjøl skulu latast Fiskimálaráðnum og góðkennast áðrenn málið kann avgreiðast endaligt. Somuleiðis skal møgulig kanning gerast av ognarviðurskiftum, sambært § 3 í kunngerðini, áðrenn fiskiloyvi kann útskrivast.

Ein útgreining av niðurstøðuni hjá metingarnevndini sæst í hjálagda skjali.

Blíðar heilsur

Rógvi Reinert
aðalstjóri